


# Starvsfólkatørvurin í privatu vinnuni

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Starvsfólkatørvurin er umfatandi

## Samandráttur

Privati arbeiðsmarknaðurin fer næstu árini at mangla nógv starvsfólk. Í løtuni vanta føroyskum fyritøkum millum 270 til 350 starvsfólk og komandi árini fer tørvurin at vaksa enn meira. Um fimm ár roknar privata vinnan við at hava brúk fyri millum 700 til 850 starvsfólkum afturat.

Fáa fyritøkurnar ikki fatur á neyðugu starvsfólkunum, fær tað avleiðingar fyri fyritøkurnar og fyri føroyska búskapin. Fyritøkurnar bera ótta fyri, at framburðurin minkar ella steðgar. Møguleikarnir at bjóða upp á nýggj arbeiði gerast minni og tænastan, tær veita, versnar. Eisini nevna tær møguleikan fyri, at verkætlanir fara at draga út, og at grøna orkuskiftið verður seinkað.

### Um kanningina

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur spurt 100 fyritøkur um teirra starvsfólkatørv í løtuni og um fimm ár.

Fyritøkurnar í kanningini umboða umleið 9.100 ársverk í privatu vinnu.

### Yrkislærd starvsfólk

Tað er gravgangur eftir at seta yrkislærd starvsfólk í starv.

Fyritøkurnar leita millum annað eftir smiðum, mekanikarum, sølufólkum, húsasmiðum, kokkum, tænarum, eletrikarum, sveisarum, alarum, snikkarum og bakarum.

### Útlendsku starvsfólkini

Yvir 70 prosent av fyritøkunum í kanningini hava útlendsk starvsfólk í starvi.

Útlendsku starvsfólkini hava stóran týdning fyri privatu vinnuna í Føroyum. Fyri ávísar fyritøkur hava tey heilt avgerandi týdning.

### Útbúgvingarskipanin

Útbúgvingarskipanin er avgerandi liður í at veita privatu vinnuni nóg mikið av starvsfólkum í framtíðini.

Útbúgvingarskipanin skal eisini vera við til at tryggja, at privata vinnan fær fatur á starvsfólkum við røttu førleikunum.

### Kt-førleikar

Tað er stórur tørvur á starvsfólkum við kt-førleikum í privatu vinnuni í Føroyum, men tey eru trupul at finna.

Flest allar kt-fyritøkur og aðrar fyritøkur, ið hava tørv á kt-fólki, ætla at økja um sítt virksemi. Men vantandi kt-fólkini er ein bygnaðarlig forðing fyri at vaksa og mennast.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY



# Stutt um kanningina

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur spurt 100 fyritøkur um teirra starvsfólkatørv í løtuni og um fimm ár. Kanningin varð gjørd í døgunum frá 8. til 27. november 2023.

Fyritøkurnar, ið vórðu spurdar, vórðu ikki tilvildarliga valdar út. Tað merkir, at kanningin ikki er líka umboðandi í mun til eina kanning, har fyritøkurnar vórðu tilvildarliga valdar. Okkara mannagongd tryggjar hinvegin, at spurdu fyritøkurnar umboða ein rættiliga stóran part av privata arbeiðsmarknaðinum. Eisini tryggjar hon, at ein spjaðing er millum spurdu fyritøkurnar í mun til støðd, landafrøði og vinnugreinar.

Fyrst vórðu tær 50 størstu limafyritøkurnar í Føroya Arbeiðsgevarafelag valdar út. Talan var um tær 50 fyritøkurnar, sum í 2022 høvdu hægstu lønarútreiðslurnar. Síðani vórðu 50 fyritøkur lagdar afturat eftir vinnugrein, støðd og landafrøði. Í hesum hópi vórðu bæði aðrar limafyritøkur hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag og fyritøkur, ið ikki eru knýttar at Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Av góðum orsøkum byggir kanningin á tær fyritøkur, sum virka í løtuni. Sostatt verður hædd ikki tikin fyri nýggjum fyritøkum og teirra møguliga tørvi í komandi tíðum.

### Kvantitativ og kvalitativ

Kanningin er bæði kvantitativ og kvalitativ. Fyritøkurnar vórðu spurdar um at seta tøl á ymiskar spurningar, men tær vórðu eisini bidnar um at seta orð á ymisku avbjóðingarnar.

Kanningin bleiv skipað soleiðis, at starvsfólk í Vinnuhúsinum ringdu til fyritøkurnar. Fyritøkurnar fingu spurningarnar, áðrenn telefonsamrøðan bleiv gjørd, so tær høvdu stundir til at fyrireika síni svar.

### Vinnugreinir í kanningini

Alivinna, bakarí, bilasølur, byggivinna, botnfiskaframleiðsluvirkir, ferðavinna, fíggjarvinna, flutningsvinna, framleiðsluvinna, handilsvinna, heilsølur, kt-vinna, orkuvinna, ráðgevaravinna, skipasmíð, reiðarí (fiski- og handilsskip), samskiftisvinna, smiðjur, tænastuvinna, uppisjóvarframleiðsla og veitingarvinna.

### Ársverk í kanningini

Fyritøkurnar í kanningini umboða umleið 9.100 ársverk í privatu vinnuni. Tað ber ikki til at siga neyvt, hvussu stórur partur hetta er av samlaðu ársverkunum í privatu vinnuni, tí almennu hagtølini byggja ikki á ársverk.

Ein meting, er, at kanningin umboðar umleið tríggjar fjórðingar av øllum ársverkum í privatu vinnuni.

### Fortreytir fyri kanningini

Í tíðarskeiðinum, tá ið kanningin varð gjørd, var ein ávís óvissa um framtíðina hjá Barentshavsflotanum og eisini fyltu uppsagnirnar í framleiðsluni hjá Bakkafrosti nógv í miðlunum. Hetta kann hava ávirkað svarini hjá fyritøkunum.

Kanningin varð eisini gjørd, áðrenn nýggja lønarsáttmálan við arbeiðarafeløgini.

# Sóknast eftir yrkislærdum starvsfólkum

Bygnaðarliga er kanningin bygd upp í tveimum. Vit heittu á fyritøkurnar um at geva síni sjónarmið til kennar um støðuna í løtuni og so at hyggja longur fram í tíð, um væntaða tørvin um fimm ár.

Kanningin vísir, at føroysku fyritøkunum vanta millum 270-350 starvsfólk í løtuni. Hyggja vit at tørvinum um fimm ár, vænta fyritøkurnar at hava ein tørv millum 700 til 850 starvsfólk.

Her er vert at leggja afturat, at talan er um eina meting við ávísum óvissum. Tær fyritøkurnar, sum høvdu í hyggju at økja um starvsfólkatalið, vóru bidnar um at áseta ítøkiliga talið, umframt at siga, hvørjum starvsfólkum, tey leita eftir. Metti starvsfólkatørvurin hjá fyritøkunum í kanningini varð síðani faldaður upp við samlaða starvsfólkatalið í privatu vinnuni í Føroyum.

## Grøna orkuskiftið

Grøna orkuskiftið og óvissan um, hvussu skjótt ella drúgt tað verður, ávirkar starvsfólkatørvin. Gongur orkuskiftið skjótt, skulu nógv starvsfólk setast í starv. Her verður serliga sipað til "tí útførandi arbeiðsmegina", sum ein fyritøka orðar seg. Ítøkiliga verður nevnt alt frá verkfrøðingum og maskinmeistarum til elektrikarar og rørleggjarar.

## Ófaklærd starvsfólk umbiðin

Tær fyritøkurnar, sum í løtuni leita eftir starvsfólkum, spyrja eisini eftir ófaklærdum starvsfólkum. Talan er um fyritøkur í nógvum ymiskum vinnugreinum.

### Verandi tal hóskandi

Helmingurin av teimum spurdu fyritøkunum halda í løtuni, at verandi tal av ársverkum er hóskandi.

Ein fjórðingur ætlar at seta fleiri starvsfólk í starv. Spurd um, hvussu nógv fólk, tey hava í hyggju at seta afturat, siga heili 81 %, at tey vilja seta millum 1 og 5 starvsfólk.



### Léttari ella torførari?

Fyritøkurnar vórðu spurdar, um tær halda tað er blivið torførari, léttari ella tað sama at finna starvsfólk seinastu tíðina. Meira enn helmingurin heldur, at støðan er tann sama. Ein fjórðingur heldur tað er torførari, meðan fimta hvør fyritøka heldur tað er léttari.




Ein veikleiki við spurninginum er, at tað møguliga ikki er nóg greitt, hvat tey leggja í svarið "tað sama". Tað kann merkja, at tað er eins torført nú, sum tað hevur verið. Tað kann eisini merkja, at tað eins létt, sum tað hevur verið.

Í kanningini verður heitt á fyritøkurnar um at útgreina síni svar. Tær nevna millum annað, at tað tykist sum um, at fólk eru meira varin.

Hetta sæst aftur í, at starvsfólk ikki skifta starv so títt, og at tey eru sinnað at taka fleiri tímar enn áður.

### Framtíðarútlit

Fyritøkurnar í kanningini eru toluliga bjartskygdar um framtíðina. 39 prosent av fyritøkunum halda verandi tal av ársverkum eisini verður hóskandi um 5 ár.

Yvir helmingurin ætlar sær um fimm ár at vaksa um starvsfólkatalið.



Hyggja vit nærri at hvørjum starvsfólkum, fyritøkurnar leita eftir um fimm ár, so eru starvsfólk við yrkisútbúgvingum høgt í metum. Av samlaða starvsfólkatørvinum telja yrkislærdu starvsfólkini 55 prosent. Teimum á baki koma tey ófaklærdu starvsfólkini, ið telja 26 prosent, starvsfólk við langari útbúgving 12 prosent, meðan starvsfólkini við miðallangari útbúgving sjey prosent.




Talan er um yrkislærd starvsfólk í breiðum týdningi. Fyritøkurnar leita millum annað eftir rørsmiðum, maskinsmiðum, rørleggjarum, plastsveisarum, mekanikarum, sølufólkum, skipsmálarum, skipselekrikarum, bilmekanikarar, alarum, húsasmiðum, kokkum, elektrikarum, kondittarum, sveisarum, tænarum, alarum, logistikkfólki, snikkarum og bakarum.

Tørvurin á ófaklærdum starvsfólkum byggir á starvsfólk til kryvjivirkini, botnfiskavirkini, umframt køkshjálp, gongsfólk, reingerðsfólk og fólk til handilsvinnuna.

Hyggja vit eftir teimum, sum leita eftir starvsfólkum við miðal – og langum útbúgvingum, er millum annað talan um byggifrøðingar, marknaðarfólk, verkfrøðingar, ymiskir teknikarar, maskinmeistarar, sølufólk, maskinverkfrøðingar, lívfrøðingar, búskaparfrøðingar, kemiverkfrøðingar, løgfrøðingar, arkitektar, verkætlanarleiðarar, KT frøðingar og granskarar.

## Hvør er tørvurin á yrkislærdum?

### Í løtuni

1. Húsasmiðir
2. Smiðir
3. Elektrikarar
4. Kokkar
5. Fulltiknir dekkarar
6. Alarar
7. Sølufólk
8. Kundaráðgevar

### Um fimm ár

1. Fulltiknir dekkarar
2. Smiðir
3. Húsasmiðir
4. Elektrikarar
5. Sølufólk
6. Tænarar
7. Krambafólk
8. Alarar

## Hví er tað so torført?

Allar fyritøkurnar verða spurdar um, hvør orsøkin kann vera til, at tær ikki fáa fatur á neyðugu starvsfólkunum. Millum svarini eru:

- Bústaðartørvurin
- Ov høgur skattur
- Lága arbeiðsloysið
- Torført at fáa føroyingar at arbeiða í framleiðsluvinnuni
- Landafrøði, tí fyritøkan er staðsett eitt sindur avsíðis
- Starvsfólk við røttu útbúgvingum vanta
- Neyðuga netverkið er ikki nóg gott
- Hørð kapping um løn og setanarviðurskifti
- Manglandi útbúgvingarmøguleikar í Føroyum

Tær fyritøkurnar, sum fyrst og fremst hava tørv á ófaklærdari arbeiðsmegi, bera ikki ótta fyri at fáa neyðugu starvsfólkini. Hetta kemst av, at atgongdin til útlendsk starvsfólk er gjørd smidligari.

## Avleiðingarnar

Fyritøkurnar í kanningini verða eisini bidnar um at seta orð á møguligu avleiðingarnar fyri teirra virksemi, um tær ikki fáa fatur á neyðugu starvsfólkunum. Fyritøkurar nevna millum annað:

- Stagnasjón
- Ber ikki til at menna seg við teirri ferð, sum er málið
- Kappingarførið og tænasturnar versna
- Mugu í størri mun manna skipini við útlendingum – ikki føroyingum
- Møguleikin at gera nýggjar vørur og tænastur minkar
- Virksemið minkar – møguliga stytta upplatingartíðina
- Møguleikin at bjóða upp á arbeiði minkar
- Verkætlanir verða seinkaðar
- Framleiðslan lækkar ella steðgar
- Grøna orkuskiftið seinkast

# Útlendsk starvsfólk stóran týdning

Útlendsk starvsfólk hava stóran týdning fyri privatu vinnuna í Føroyum. Fyri útflutningsvinnuna hevur hon avgerandi týdning fyri virksemið. Tá ið vit í hesum parti umrøða útlendingar, so er talan um borgarar, sum ikki eru danskir ríkisborgarar.

Yvir 70 prosent av teimum fyritøkum, vit hava spurt, hava útlendingar í starvi. Í størstan mun er talan um ófaklærd starvsfólk. Hyggja vit nærri at vinnugreinunum eru flestu útlendingarnar at finna í sjóvinnuni og framleiðsluvinnuni, serliga á kryvjivirkjunum, botnfiskaframleiðsluni og í handverkaravinnuni. Eisini eru nógvir útlendingar í ferðavinnuni og í húsarhaldstænastum, serliga innan reingerð. Tað, sum er serstakt við útlendingunum í sjóvinnnuni, er, at nógvir teirra ongantíð koma í land í Føroyum.

## Útlendingar í starvi

Tað er sera ymiskt, hvussu nógvir útlendingar eru í starvi hjá føroysku fyritøkunum. Í kanningini siga 74 prosent av teimum spurdu fyritøkunum, at tey hava millum 1-20 útlendsk starvsfólk. Sjey prosent hava millum 21-50 útlendsk starvsfólk, 13 prosent hava millum 51-100 útlendsk starvsfólk og seks prosent hava yvir 100 útlendsk starvsfólk í starvi.




Fyritøkur vísa á, at góðu møguleikarnir at fáa fatur á útlendskum starvsfólki, hevur við sær, at tað letur seg gera at ”skalera” upp ella niður, tá ið tú sum fyritøka hevur tørv á tí.

Føroya Arbeiðsgevarafelag spurdi fyritøkurnar, hvørjar skipanirnar tær hava nýtt fyri at fáa útlendsk starvsfólk til landið. Nógv tær flestu hava brúkt hesar skipanirnar:

- ES-skipanina, sum ger tað smidligari hjá undangóðkendum arbeiðsgevarum at seta starvsfólk úr ES í starv.
- Skipanina fyri triðjalands starvsfólk. Eisini rópt snarskipanin.

Hyggja vit eftir ítøkiligu tølunum hava 61 prosent av teimum fyritøkum, ið hava útlendingar í starvi, brúkt ES-skipanina, meðan 60 prosent hava nýtt snarskipanina.




Tað eru eisini nógv útlendsk starvsfólk á privata arbeiðsmarknaðinum, ið hava varandi uppihaldsloyvi í Føroyum. Tað kann vera umvegis familjusamanføring, at tey eru gift við føroyskum maka ella gift við útlendskum maka, sum hevur arbeiðsloyvi í Føroyum. 54 prosent av teimum fyritøkum, ið hava útlendingar í starvi, siga seg hava starvsfólk, ið hava varandi uppihaldsloyvi í Føroyum.

Tað verður eisini víst á, at lønarlagið í eysturevropa er við árunum hækkað munandi og er í dag kappingarført við lønarlagið í Føroyum. Hetta merkir, at tað ikki er so lætt at fáa starvsfólk úr Póllandi, Rumenia og Bulgaria, sum tað áður hevur verið.

## Snarskipanin neyðug

Í spurnarkanningini hava fyritøkurnar í fleiri umførum møguleikan sjálvar at seta orð á ymisk viðurskifti. Hyggja vit nærri eftir viðmerkingunum frá teimum einstøku fyritøkum, ið snúgva seg um útlendingaøkið, so er boðskapurin rættiliga greiður: Snarskipanin hevur veruliga lætt um møguleikarnar at útvega neyðugu starvsfólkini til at fasthalda og økja framleiðsluna.

### Asia og eysturevropa

Útlendsku starvsfólkini koma úr nógvum ymiskum londum. Høvuðsbólkarnir samsvara væl við almennu hagtølini hjá Hagstovu Føroya. Tey flestu stava úr Asia, serliga Teilandi og Filipsoyggjunum, nógv koma úr eysturevropeisku londunum, eitt nú Póllandi, Rumenia, Bulgaria og baltisku londunum, og eisini er ein partur úr Afrika og Suðuramerika.

Fyritøkurnar vísa á, at hugurin hjá føroyingum at arbeiða í siðbudnari framleiðslu tykist at minka. Skeivar arbeiðstíðir og árstíðartreytað arbeiðið verða nevndar sum orsøkir til, at føroyingar himprast við at arbeiða í framleiðsluvinnuni. Sama mynd ger seg galdandi hjá fleiri skipum, sum royna eftir botnfiski undir Føroyum.

Fleiri fyritøkur hava á máli, at tey vænta innan nøkur ár, at tað at kalla bara verða útlendsk starvsfólk í framleiðsluvinnuni, tí tað er ov fá føroysk starvsfólk. Av somu orsøk fegnast tær um skipanirnar, ið kunnu útvega útlendsk starvsfólk. Hon hevur givið fyritøkunum ein botn av starvsfólkum, sum eru støðug. Eisini vilja útlendsk starvsfólk ofta arbeiða nógv.

## Fyritøkurnar halda, at politiska skipanin eigur at:

- Umhugsa at broyta prosentmarkið fyri, nær Snarskipanin dettur burtur. Tað merkir, at prosentmarkið fyri, at arbeiðsloysið skal vera undir 3,5 prosent, skal hækka.

- Bera so í bandi, at tú sum fyritøka ikki skalt bíða upp til 30 dagar, áðrenn triðjalands starvsfólkini kunnu byrja. Ein møguleiki er at skipa tað á sama hátt sum við ES-skipanini, har tú kanst byrja alt fyri eitt.

- Lata upp fyri møguleikanum, at triðjalands starvsfólkini kunnu hava tilknýti til meira enn ein arbeiðsgevara. Ein annar møguleiki kundi verið, at virkisgreinir samstarvaðu um starvsfólkini. Til dømis tær vinnugreinar, sum hava árstíðartreytað virksemi.

## Útlendskir ráðgevar

Flestu útlendsku starvsfólkini í Føroyum eru ófakærd. Men tað er ikki bara henni tørvur er á. Eisini kann gerast neyðugt at fáa útlendska fakliga arbeiðsmegi á ymiskum samfelagsøkjum.

Ávísar vinnugreinir hava ikki nógv útlendsk starvsfólk í starvi, men tær nevna, at hetta kann fara at gerast neyðugt í framtíðini. Um tað gerst ov tvørligt at finna røttu starvsfólki við røttu fakligu førleikunum, tað verið seg eitt nú innan KT í breiðum týdningi, so kann gerast neyðugt at brúka útlendskar ráðgevar til uppgávur, sum tey ikki kunnu loysa sjálvi. Í hesum føri er ofta talan um starvsfólk við langari útbúgving, har tey hava vunnið eina servitan á ávísum økjum.

Onkur fyritøka vísir á, at kappingin um útlendsk starvsfólk við servitan er so hørð, at tað er neyðugt, at Føroyar gerast meira lokkandi at arbeiða í, eitt nú í mun til lønarskatt. Eisini verður tørvurin á fleiri dupultskattaavtalum havdur á lofti.

## Integratión

Einstakar fyritøkur nevna tørvin á, at føroysk undirvísing sum annað mál at verða skipað øðrvisi. Tað er trupult hjá teimum útlendingum, sum arbeiða vanliga tíð, at fara til undirvísing. Hetta kemst millum annað av kravinum um at arbeiða 40 tímar um vikuna. Skotið verður upp, at undirvísing eisini er møgulig annaðhvørt seint seinnapartar ella um kvøldið.

Hetta hevði verið ein stór hjálp hjá teimum mongu útlendingunum, sum vilja læra seg føroyskt. Hetta hevði eisini gjørt tað lættari hjá teimum mongu útlendingunum, sum hava eina útbúgving, at flutt seg til eitt starv, sum samsvarar við teirra fakligu førleikar.

# Serskattaskipanirnar eru ein forðing

Nærum sætta hvør fyritøka í kanningini vísir ítøkiliga á, at serskattaskipanirnar forða fyri einari javnari kapping um starvsfólkini. Her er vert at leggja sær í geyma, at fyritøkurnar vórðu ikki ítøkiliga bidnar um at svara spurningum um serskattaskipanirnar. Svarið um serskattaskipanirnar kom hinvegin í opnum spurningum um møguligar forðingar fyri at finna skikkaðu starvsfólkini.

Fyritøkurnar, sum nevna serskattaskipanirnar, virka í ymiskum vinnugreinum: Alivinnuni, veitaravinnuni, fiskivinnuni, byggivinnuni, handverkaravinnuni og sjóvinnuni. Fleiri teirra leita ikki í løtuni eftir fleiri starvsfólkum, men halda kortini, at serskattaskipanirnar órógva møguleikarnar at seta skikkað starvsfólk. Hetta hevur við sær, at fyritøkur ikki kunnu átaka sær allar tær uppgávur, sum tær kundu, høvdu tær havt neyðugu starvsfólkini.

Í hesum bólki teljast bæði fyritøkur við bæði nógvum starvsfólkum í starvi, men eisini eru fyritøkur, sum ikki hava so nógv starvsfólk í starvi. Fyritøkurnar eru staðsettar kring alt landið.

## Altjóða kapping

Føroysku fyritøkurnar eru í beinleiðis kapping við útlendskar arbeiðsgevarar um handverkararnar, sum arbeiða uttanlands. Fleiri av hesum fyritøkunum virka á altjóða marknaðinum. Tær vísa á, at tað er ein minsta treyt, at tær eru javnsettar við sínar útlendsku kappingarneytar, tá ið tær skulu kappast um skikkaðu føroysku arbeiðsmegina. Hesar fyritøkurnar nevna ítøkiliga, at serskattaskipanirnar á arbeiðsmarknaðinum, ið gera tað meira lokkandi at arbeiða uttanlands, skulu takast av.

## Yrkislærd starvsfólk

Allar fyritøkurnar, ið nevndu serskattaskipanirnar, hava í hyggju at seta fleiri starvsfólk í starv um fimm ár. Tær leita fyrst og fremst eftir yrkislærdari arbeiðsmegi í breiðari merking. Yvirskipað er talan um mekanikarar, timburmenn, eletrikarar, sveisarar, húsasmiðir, bygningssnikkarar, rørsmiðir, maskinsmiðir, maskinmeistarar og rørleggjarar.

## Arbeiða í frítíðini

Frítíðin hjá føroyskum handverkarunum, sum arbeiða uttanlands, ávirkar eisini vinnuna herheima. Nakrar fyritøkur nevna, at tær hava havt føroyskar handverkarar, sum starvast fast í Noregi, at loysa ymiskar uppgávur, men hetta hevur ikki roynst væl. Tað hevur havt ónøgd við sær millum hinar handverkararnar í fyritøkunum.

## Kappast við Noreg

Noreg verður afturvendandi nevnt sum tað landið, sum fer avstað við nógvum handverkarum, ið áður hava arbeitt í Føroyum. Umframt kappingina um løn og arbeiðsumstøður annars, gera skattligu reglurnar, at tað er nógv meira lokkandi at arbeiða í Noregi, og so pendla ímillum londini.

Alt eftir ítøkiligu umstøðunum, eru umleið 5.000 kr. meira eftir í lønarposanum hjá einum løntakara, sum forvinnur 35.000 kr. og býr í Føroyum, men arbeiðir á landi í Noregi.

# KT-førleikar høgt í metum

Tað er stórur tørvur á starvsfólkum við kt-førleikum í privatu vinnuni í Føroyum. Tað vísa serliga kt-vinnan, fíggjarvinnan og ráðgevaravinnan á, men tørvurin finst eisini aðrastaðni, eitt nú hjá framleiðslufyritøkunum.

Flest allar kt-fyritøkurnar hava í hyggju at økja um sítt virksemi, bæði nú og um fimm ár. Men vantandi kt-fólkini eru ein bygnaðarlig forðing fyri at vaksa og mennast.

Talgilda menningin heldur fram og hon gongur skjótt. Nógvar fyritøkur, sum vórðu spurdar í kanningini, nevndu, at tær eru í einari áhaldandi tilgongd at flyta seg frá manuellum inntøppingum til eina alsamt meira umfatandi talgilding. Hetta setur stór krøv til skikkað starvsfólk við ymiskum kt-førleikum.

Tað er enn ov tíðliga at siga, hvussu kollveltandi vitlíki verður í teimum ymisku vinnugreinunum, men nógvar fyritøkur siga, at menningin av hesari tøknini, fer bara at seta nýggj og onnur krøv til førleikarnar hjá starvsfólkunum.

### Bygnaðarligar forðingar

Nakrar fyritøkur halda tað verða torført at fáa útlendsk kt-fólk at flyta til Føroya. Í øllum londum kring okkum vanta kt-fólk. Tað skal tí leggjast nógv fyri at gera tað lokkandi at vera kt-fólk í Føroyum.

Tað verður víst á bústaðartrotið sum eina bygnaðarliga forðing. Ein onnur forðing er, at kt-fólk, sum arbeiða í Føroyum, mugu vera fjølbroytt og fevna um fleiri øki, enn tey eru von við uttanlands.

Eisini verður nevnt, at tað ber ikki til at fáa skikkaðu kt-fólkini til Føroya, tí lønarskatturin er ov høgur. Tað er neyðugt at gera fleiri dupultskattaavtalur við onnur lond fyri at eggja fleiri kt-fólkum at flyta til Føroyar.

### Breiður tørvur

Tørvurin hjá kt-vinnuni, fíggjarvinnuni og ráðgevaravinnuni er breiður. Talan er um alt frá yrkislærdum starvsfólkum til starvsfólk við bæði miðallongum og langum kt-útbúgvingum. Ítøkiliga verður sóknast eftir teldufólkum, forritarum og fólkum til infrastruktur. Eisini verður leitað eftir starvsfólkum við bachelor- og masterútbúgving innan kt.

### Eftirútbúgving raðfestast

Eftirútbúgving er eitt annað neyðugt stig. Tøknin skiftir støðugt og við teimum broytast krøvini til nýggjar førleikar. Talgilda framtíðin setur krøv til at endurútbúgva fólk skjótari og títtari. Verður tað ikki gjørt, megna fyritøkurnar ikki at fylgja við kappingini við útheimin.

## Fleiri skulu lesa kt

Sambært Vakstrarforum frá 2022 arbeiða í samlaðu føroysku arbeiðsfjøldini 2,6 prosent innan kt. Til samanberingar arbeiða 4,3 prosent við kt í ES.

Fyritøkurnar halda, at tað er neyðugt bæði at útbúgva nógv fleiri fólk í kt í Føroyum og at seta fleiri útbúgvingar á stovn. Skulu fyritøkurnar mennast og vaksa, eru langtíðaríløgur í at útbúgva kt-fólk ein fyritreyt.

Fyritøkurnar halda, at sambandið millum lærustovnarnar og fyritøkurnar í Føroyum kann betrast. Tær vísa millum annað á, at tað var eitt mistak at taka av datamatikaraútbúgvingina. Eisini skal Fróðskaparsetrið raðfesta kt-økið munandi hægri, halda fyritøkurnar.

Møguleikin fyri at skipa fyri styttri KT-útbúgvingum til tey starvsfólk, sum frammanundan hava eina útbúgving, verður nevndur. Hetta nýtist ikki at vera á masterstig, men okkurt “millumting” hjá teimum, sum hava arbeiðsroyndir og útbúgving frammanundan.

**Størv innan kt í Føroyum**

**2,6 %**

**Størv innan kt í ES**

**4,3 %**

## Vøksturin verður avmarkaður

Fyritøkurnar vísa á, at starvsfólkatørvurin ger tað torført at vaksa og mennast í teirri ferð, tey vilja. Møguleikin fyri nýskapan og nýhugsan verður eisini avmarkaður, tá ið starvsfólk við viðkomandi útbúgvingum og førleikum vanta.

Ein ítøkilig avleiðing kann gerast, at tað verður neyðugt at minka um virksemið. Eisini kann stóri tørvurin bæði seinka talgildingini og tilgongdini at effektivisera arbeiðsgongdir í føroyska samfelagum.

Fyritøkur vísa á vandan, at tá ið so fá kt-fólk eru, er tað skjótt, at vit detta aftur úr í Føroyum. Bæði í mun til møguleikarnar at fáa røttu starvsfólkini, sum ofta eru føroyingar, sum koma úr útlondum, har tey hava lisið og arbeitt. Úrslitið gerst, at tað verður torførari at fáa nøgdar kundar. Ikki minst teir kundar, sum hava búð uttanlands og hava innlit í mongu framkomnu skipanirnar, ið lata seg gera – á til dømis banka- og tryggingarøkinum – uttanlands.

Fleiri fyritøkur siga, at tær eru noyddar at heita á útlendskar ráðgevar um at loysa fleiri uppgávur. Eisini verða aðrar uppgávur loystar av øðrum ráðgevum “uttan fyri húsið”.

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY



# Útbúgvingarskipanin tryggja røttu starvsfólkini

Útbúgvingarskipanin fyllir nógv hjá fyritøkunum, sum luttaka í kanningini. At kalla allar virkisgreinir nevna útbúgvingarverkið, sum ein sera týðandi part í málinum at tryggja nóg mikið av starvsfólkum í framtíðini. Skúlaverkið skal eisini vera við at tryggja, at privata vinnan fær fatur á starvsfólkum við røttu førleikunum.

Nógvar fyritøkur halda, at vinnulívið og útbugvingarskipanin ikki hanga nóg væl saman. Hetta ger seg galdandi í fólkaskúlanum, miðnámi og hægri útbúgvingum. Tað er ein stórur tørvur á at tryggja ein størri samanhang millum útbúgvingarverkið og starvsfólkatørvin í privatu vinnuni frameftir.

## Yrkisútbúgvingar til heiður og æru

Stóri tørvurin á yrkislærdari arbeiðsmegi hevur við sær, at nógvar fyritøkur í kanningini siga, at nógv størri áherðsla eigur at verða løgd í at marknaðarføra yrkisútbúgvingarnar. Hetta skal gerast miðvíst í bæði fólkaskúlanum og á miðnámi. Hetta skal samstundis vera gróðrarbotnurin undir einari hugburðsbroyting, har tey ungu í størri mun fara at síggja virðið í yrkisútbúgvingum.

Handverksvinnan eigur at marknaðarføra seg enn meira og vísa á allar møguleikarnar at útbúgva seg. Eitt nú verður dømið nýtt um at varpa ljós á tann veruleika, at tú longu sum 21 ára gomul kann hava eina yrkisútbúgving, og framvegis hava møguleika at fara undir víðarilesnað.

Nógvar fyritøkur ásanna, at tað, at ófaklærd starvsfólk í stóran mun eisini manna nógv faklærd størv í Føroyum, ikki lyftir góðskuna á arbeiðinum hjá fyritøkunum. Hetta er eisini ein grundgeving fyri at styrkja yrkisútbúgvingarnar í Føroyum, og økja um talið á teimum sum fáa eina yrkisútbúgving.

## Nýggjar útbúgvingar

Fleiri fyritøkur, sum útflyta sínar vørur, vísa á, at útbúgvingarskipanin í Føroyum ikki loftar nóg væl útflutningsvinnuni. Hvørki áhugin fyri hesum øki ella útbúgvingarútboði er nøktandi, og tað undrar, tí talan er ofta um eitt spennandi øki og møguleiki fyri góðari løn.

Í sama viðfangi verður spurningur settur við, hvussu tað ber til, tá ið flest allar fyritøkur í Føroyum onkursvegna eru í innflutningi ella útflutningi, at logistikkur fyllur so lítið í teimum ymisku útbúgvingunum.

**Yvirskipað eru ynskini hjá vinnuni hesi:**

- **Mugu útbúgva fleiri fólk innan framleiðslu**
- **Shipping útbúgving á Glasir**
- **Betri útbúgvingarmøguleikar innan ferðavinnu. Neyðugt at flyta móttøku- og tænaraútbúgvingarnar til Føroya. Eisini skulu stig takast til at menna kokkayrkið í Føroyum**

- **Fleiri yrkisútbúgvingar í Føroyum. Byggismiður, prosessoperatør og entreprenørmekanikari verða nevnd**
- **Eiga at umhugsa at taka fíggjarbúskap inn á hvørjum ári**
- **Tú kanst bara taka HD roknskap í Føroyum. Eigur at vera møguligt at taka HD fígging og HD í fíggjarligari ráðgeving eisini**

Fyritøkur í fíggjarvinnuni vísa á ein nýggjan útbúgvingarmøguleika, sum kundi verið ein millumvøra millum studentskúla og eina langa akademiska útbúgving. Hetta kundi gagnað bankum, tryggingarfeløgum og pensjónsfeløgum. Fleiri teirra hava tørv á starvsfólkum, ið hava eina generella miðallanga útbúgving við fleiri ymiskum førleikum – ikki minst kt - førleikum.

Hetta kundi eisini gagnað teimum, sum ikki vilja at taka eina langa útbúgving.

### Lærlingaøkið

Lærlingaøkið fær stóra rúmd í kanningini. Júst lærlingar verða sæddir sum ein sera týðandi pallur fyri at tryggja eina støðuga og neyðuga starvsfólkatilgongd í privatu vinnuni í Føroyum.

Fyritøkurnar og virkisgreinirnar eru sera fjølbroyttar, og av somu orsøk verða nógvir ymiskir tættir nevndir á lærlingaøkinum. Til dømis er stórur munur, hvussu tørvurin er á lærlingaøkinum hjá handverkaravinnuni, handilsvinnuni, ferðavinnuni og hjá eitt nú fíggjarvinnuni.

Tørvurin á lærlingum endurspeglar í stóra mun tørvin hjá privatu vinnuni á yrkislærdari arbeiðsmegi. Talan er um smiðir av øllum handaslagi, lakerarar, kokkar, kondittarar, speditørar, húsasmiðir, alarar, málarar, elektrikarar, slaktarar, bakarar og handilslærlingar.

Hyggja vit yvirskipað eftir handverkaravinnuni fyrst, so nevna fleiri fyritøkur kravið um at fara til Danmarkar á skúlabonk, sum eina stóra avbjóðing. Hetta er ein stór forðing hjá nógvum lærlingum innan ymisk handverk, og heldur teimum aftur at fara í læru, verður sagt.

Úrslitið gerst, at tilgongdin til handverksvinnuna ikki er so góð, sum hon átti. Møguleikin fyri at flyta skúlagongdina til Føroya verður nevnt sum ein skilagóð loysn í ávísum førum.

Í fíggjarvinnuni er ein varhugi um, at tað er torførari at finna lærlingar. Hetta hevur ikki verið ein avbjóðing áður, men gongdin seinastu árini vísir, at tekin eru um, at eitt lærlingapláss í fíggjarvinnuni ikki er so áhugavert longur. Vanligt var, at starvsfólk, sum høvdu lært í fíggjarvinnuni, starvaðust har alt lívið. Nú er gongdin broytt. Fleiri útlærd starvsfólk velja annaðhvørt at skifta í heilt aðra vinnugrein, meðan onnur brúka læruplássið sum lopfjøl til at fara undir víðari lestur.

## Fróðskaparsetrið

Tær privatu fyritøkurnar, sum hava tørv á starvsfólkum við longri útbúgvingum, nevna Fróðskaparsetur Føroya sum ein týðandi klekingardepil í at tryggja eina neyðuga tilgongd av starvsfólkum.

Ítøkiliga verður sagt, at tað er neyðugt at fáa so nógvar føroyingar sum gjørligt at lesa tekniskar útbúgvingar, tí kanningar vísa, at tørvurin júst á hesum førleikum verður stórur frameftir.

Einstakar fyritøkur halda, at Fróðskaparsetrið eigur at styrkja sítt samstarv við danska útbúgvingarstovnin, DTU. Møguleikin fyri at taka ein part av útbúgvingini í Føroyum verður nevndur, eisini sum lesandi á einstøkum lærugreinum, meðan tey arbeiða. Hetta hevði havt við sær, at fólk fingu eitt tættari tilknýti til føroysku vinnuna, og kunnu koma í starvslæru og/ella -venjing í Føroyum.

Umfatandi grøna orkuskiftið kann fara at krevja, at innihaldið í útbúgvingunum á Fróðskaparsetrinum støðugt má eftirmetast, dagførast og tillagast – eitt nú orkuverkfrøði.

Fróðskaparsetrið verður eisini í breiðum týdningi nevnt sum ein týðandi stovnur fyri at varðveita tey ungu í Føroyum. Megna vit hava at eitt vælútbygt og sterkt universitet í Føroyum, so er størri sannlíkindi fyri at tey ungu velja at búgva her. Tað er gott í mun til breiða starvsfólkatørvin, verður sagt.

## Eftirútbúgving

Nógvar fyritøkur í privatu vinnuni ásanna, at stórur tørvur er á at endurútbúgva síni starvsfólk. Talan er um fyritøkur í nógvum ymiskum vinnugreinum. Tað eru fá starvsfólk, ið kunnu seta seg aftur á eftir lokna útbúgving og vænta, at tað ikki gerst neyðugt endurmenna sínar førleikar. Hetta ger seg galdandi í eitt nú fíggjarvinnuni, ráðgevaravinnuni, men eisini í handverkaravinnuni, har eitt nú ein handverkara pluss endurútbúgving verður nevnd.

Eisini er neyðugt at leggja størri dent á vaksnamannalæring. Onkur fyritøka vísir á, at tað er ov trupult at hava "vaksin" í læru, tí teirra lærlingaløn er alt ov lág í mun til fíggjarligu skyldurnar, tú vanliga hevur sum vaksin.

# Millum barnaansing og serligt arbeiðsføri

Fyritøkurnar í kanningini nevna eisini onnur viðurskifti, ið kunnu verða við til at bøta um møguleikarnar at finna neyðugu starvsfólkini frameftir. Millum økini eru bøtt barnaansing, bústaðartrot, borgarar við serligum arbeiðsføri, pensjónistar og betri starvsfólkarøkt

Nógvar fyritøkur vísa á, at innanhýsis starvsfólkarøktin er ein týðandi liður í bæði at halda fast um verandi starvsfólkahóp og at vera eitt lokkandi arbeiðspláss hjá komandi starvsfólkum. Orðið starvsfólkatrivnaður verður nevnt nakrar ferðir.

Tað verður víst á, at tað verður gjørt nógv fyri at fáa starvsfólk at trívast. Tað kann til dømis vera ein góð matarskipan. Eisini verður víst á týdningin hjá einari fyritøku at hava eitt gott umdømi.
Hyggja vit eitt sindur longur fram í tíð, so vísa fyritøkur á, at tað er týðandi at hava tíðarhóskandi arbeiðstreytir fyri at gera tað lokkandi hjá komandi ættarliði og komandi serfrøðingum. Hetta kunnu til dømis verða treytir um, hvussu arbeiði verður skipað og hvussu arbeiðstíðirnar eru.

## Barnaansing

Barnaansingarøkið er ein forðing fyri at fáa fatur á neyðugu starvsfólkunum. Tað verður víst á, at ansingarøkið má í størri mun tillagast arbeiðsmarknaðinum. Tað merkir ítøkiliga, at upplatingartíðirnar mugu vera longri. At lata aftur til samans seks vikur um árið, verður nevnt sum ein forðing. Eisini er summarferian ov drúgv, og tað gevur foreldrunum eina avbjóðing.

Tørvurin á ansingarplássum – serliga í Havn – verður nevndur sum ein meinbogi hjá fyritøkunum, tí fleiri dømi eru um, at starvsfólk koma seint úr barnsburðarfarloyvi, tí eingin ansing er. At dagstovnar – serliga í Havn – javnan mugu lata aftur fyri tíð er eisini órógvandi hjá fleiri fyritøkum.

## Bústaðartrotið

Stóri tørvurin á bústøðum í Føroyum halda fyritøkur vera ein stór forðing í at fáa fleiri starvsfólk sett í starv.
Tað er sera torført hjá fyritøkum at finna eitt stað til starvsfólkini at búgva í. Tí er neyðugt við fleiri bústøðum, um atgongdin til neyðugu starvsfólkini skal betrast.

Skulu útisetar fáast heimaaftur er neyðugt við dygdargóðum bústøðum og barnaansing.

## Serligt arbeiðsføri

Nakrir arbeiðsgevarar hava gjørt vart við, at tey halda, at skipanirnar undir Almannaverkinum ikki eru nóg liðiligar, tá ið fólk við serligum arbeiðsføri skulu setast í starv. Tær vísa millum annað á, at høvdu skipanirnar verið meira smidligar, var møguleiki fyri at seta nógv fleiri starvsfólk í starv munandi betri.

## Pensjónistar

Í kanningini fylla pensjónistar sum starvsfólk ikki nógv. Einstakar fyritøkur siga, at tær kunnu í størri mun gagnnýta pensjónistar. Av somu orsøk er neyðugt at gera tað meira lokkandi hjá teimum at fara til arbeiðis.

Ein handverkarafyritøka sigur til dømis, at stóri starvsfólkatørvurin hevur við sær, at privatkundarnir verða raðfestir niðarliga. Í fleiri førum kunnu pensjónistar átaka sær tær minni krevjandi – men ikki minni týdningarmiklu - privatkundauppgávurnar.